TING-HELLAN

# ST – á breddanum

**Komandi vikurnar fer ST at vera á breddanum í alheims pressuni. Høvuðsorsøkin er royndirnar at gera bygnaðarbroytingar, soleiðis at felagsskapurin gerst nútíðarhóskandi og meira effektivur. ST er somuleiðis 60 ár í ár. Vanligt er, at aðalfundir eru um heystið, har sendinevndir frá øllum limalondum taka støðu til uppskot og gera mótupskot til hvat felagsskapurin skal gera. Men í ár er ein serligur topfundur beint undan aðalfundinum. Hesin topfundurin, World Summit, er frá 14-16 september 2005. Væntandi vera meginparturin av stjórnarleiðarum við á hesum fundi, sum verður mettur at verða tann týdningermesti síðan stovnanina av ST. Í hesum døgum er ein forfundur til henda toppfundin, har sendinevndir taka støðu til uppskotið hjá Kofi Annan um bygnaðarbroytingar, koma við broytingaruppskotum og royna at nærkast hvørjum øðrum, áðrenn komandi toppfundin**




*Bygnaðurin hjá ST*



*Bogi Eliasen*
*stjórnmálafrøðingur,*
*cand.scient.pol*

### Hvat er ST?

ST er ein alheimssamstarvsfelagsskapur, og flestu fullveldislond eru limir. Limatalið er 191. Tá ST bleiv stovnað í 1945, var limatalið 51. ST bleiv stovnað aftaná seinna heimsbardaga av vinnaralondunum, og endamálið var at byrgja fyri at slík oyðileggjandi kríggj kundu taka seg upp aftur. Aftaná fyrra heimsbardaga, bleiv sonevnda Fólkasamgongan sett á stovn, men hon virkaði ikki. Nógv hildu, at orsøkin var at Fólkasamgongan var bygd ov nógv á rættvísi og ov lítið á trygd, umframt at USA aldrin gjørdist limur. Við stovnanini av ST var tí semja um, at høvuðsdenturin skuldi leggjast á trygd, og bleiv hetta gjørt við sonevnda Trygdarráðnum.

### Høvuðspartarnir

Høvuðspartarnir í ST eru Aðalfundurin, Trygdarráðið, Búskapar- og Sosiala Ráðið, Trusteeship Council (sum stendur fyri avtøku av hjálandaskipanum), Altjóða Dómstólurin og ST umsitingin. Høvuðssætið er í New York, men undirfelagskapir hava høvuðssæti aðrastaðni, t.d. í Geneve, Vien og Rom. Aðalskrivarin er hægsta starvið í ST. Tað er í dag Kofi Annan úr Ghana, sum situr í hesum starvinum.

### ST-umsitingin

ST umsitingini er býtt upp í fleiri ráð, nevnd kontór ella deildir. Stjórin í hesum ráðum er samstundis eisini nevndur undiraðalskrivari. Dømi um hesi ráð eru Office of Legal Affairs – lógarráðið og Department of Political Affairs – politiska ráðið. Øll hesi eru sjálvsagt undir Aðalskrivaranum Kofi Annan. Síðan 1997 hevur aðalskrivarin havt ein varaaðaskrivara knýttan at sær, hvørs høvuðsuppgávu er bygnaðarbroytingar. Umsitingin kann sostatt við fyrivarni samanberast við útinnandi valdið í eini politiska skipan.

### Aðalfundurin

Aðalfundurin kann meira samanberast við Tingið, ella lóggevandi valdið í eini politiskari skipan. Øll limalondini eru umboðaði og eru, um tey ynskja, við í samráðingum og í tingingum. Harafturat eru fleiri nevndir, bæði fastar og ad-hoc og so tær sonevndu seks høvuðsnevndirnar ella standing committees. Tingformaðurin ella forsetin fyri aðalfundin er Jean Ping úr Gabon. Millum limalondini er stór kapping um at fáa stuðul og soleiðis verða valdur til sessirnar í Trygdarráðnum og Búskapar- og Sosiala ráðnum, sum verða mett at verða tey mest umráðandi, men eisini aðrir sessir eru at tingast um. Aðalfundurin byrjar hvørt ár týsdagin í triðji vikuni í september sum hevur minst ein arbeiðsdag. Sambært reglunum verður við byrjan avgjørt, hvussu langur fundurin skal verða. Øll limalondini eru umboðaðið og øll eru javnsett í atkvøðum uttan mun til støðd.



*Kofi Annan, Aðalskrivari í ST*

### Trusteeship Council

Trusteeship Council hevur havt uppgávuna at taka av hjálandaskipanir. Hetta hevur verið skipað soleiðis, at hjálondini antin blivu samrunnin partur av miðveldinum, fingu fullveldi ella